# Mentan fyri allar aldursbólkar

**- Jú, sjálvandi eri eg ógvuliga spent, men vit kunnu ikki – og hava heldur ikki – tikið nakað fyri givið. Vit hava gjørt okkara besta og vóna sjálvsagt, at hetta er tað, sum skal til fyri at fáa alt at rigga so væl sum gjørligt, sigur Rannvá Troest, sum seinastu árini hevur lagt nógva orku í at fjálga um mentanina í Runavíkar kommunu**



*Rannvá Troest heldur, at fólk í størri mun enn áður eru farin at taka mentanina til sín. – Vit hava fingið nógvar ábendingar um, at fólk hava verið glað fyri mentanarligu tiltøkini, og hetta hevur givið okkum mót um at taka stóra tiltakið við Mentanarvikuni uppaftur, sigur hon*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**MENTANARVIKA**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Rannvá Troest, sum áður hevur starvast á Kunningarstovuni í Saltangará, men nú arbeiðir hjá Sp/f Virkisráðgeving, hevur havt úr at gera seinastu tíðina, nú allir smálutir við Mentanarvikuni, sum verður hildin í Runavíkarøkinum frá sunnudegnum komandi, skulu fáast upp á pláss.

- Øll skáin er løgd og er prentað, men tað eru altíð nakrir endar, sum skulu fáast upp á pláss, tá so nógv tiltøk skulu stáplast upp á beinini í senn.

Hon sigur, at hetta er fyrstu ferð, at serstakt blað við kunning, skrá, frásagnum um tiltøk og lýsingum hjá handlunum, sum eru limir í Handilsmiðdeplinum í økinum, verður givið út.

- Blaðið, sum kemur út í Eysturoy og Norðoyggjum, verður givið út av Virkisráðgevingini og Handilsmiðdeplinum í felag.

## Væl vitjað

Hetta er triðja árið á rað, at skipað verður fyri FaroExpo og Mentanarviku í Runavíkarøkinum.

- Tað fyrsta árið royndu vit at tengja nøkur mentanarlig tiltøk upp í vinnustevnuna, men sum árini eru liðin, eru hesi vorðin fleiri og fleiri.

Rannvá sigur, at tiltøkini hesaferð minna um tey í fjør, men í flestu førum eru tey broytt samstundis, sum nógv nýggj og forvitnislig nøvn eru at síggja í áhugaverdu skránni.

Hon sigur, at hóast nógv ymisk tiltøk vóru á skránni í fjør, bæði fyri børnum, tilkomnum og eldri, so vóru tey rættiliga væl vitjað um kvøldarnar – og at síggja til vóru tað mong, sum vitjaðu at kalla øll tiltøkini, sum kvøldini gingu.

## Spent – sjálvandi!

- Eg havi snøgt sagt ikki havt stundir at hugsa um, hvussu undirtøkan verður hesaferð, men eg vóni og vænti, at hon í minsta lagi verður eins góð og í fjør. Vit hava lagt eina skrá, sum hevur nakað fyri øll, og eg kann siga, at einki er latið upp til tilvildina.

Hon sigur seg tí vóna, at allir aldursbólkar fara at nýta høvi at vitja tey mongu tiltøkini, sum eru á skránni.

- Jú, sjálvandi eri eg ógvuliga spent, men vit kunnu ikki – og hava heldur ikki – tikið nakað fyri givið. Vit hava gjørt okkara besta og vóna sjálvsagt, at hetta er tað, sum skal til fyri at fáa alt at rigga so væl sum gjørligt.

Hon væntar, at nú eitt so snotuligt blað er givið út við skrá og kunning, fer hetta at gera sítt til, at nógv fólk fara at leita sær á Runavíkarleiðina, meðan Mentanarvika er.

## Konsertbrakið

Rannvá Toest sigur, at størsta einstaka tiltakið á Mentanarvikuni í fjør, var konsertin við dansi í Ítróttarhøllini í Runavík.

- Hetta tiltak dró eini 1400 fólk til sín, men í høllini eru pláss fyri 2000 standandi fólkum, so ongum nýtist at halda seg aftur, tí tey ikki skulu vænta sær pláss, leggur hon aftrat.

Aðrastaðni í FaroExpo-blaðnum verður kunnað nærri um stóra konsert-og dansitiltakið í Runavík, sum verður leygarkvøldið 3. november.

- Flestu tiltøkini á Mentanarvikuni eru innandura, og tí er ikki neyðugt, at veðrið – hvussu tað so enn fer at hátta sær hesar dagarnar – fær so stóra ávirkan á undirtøkuna fyri mentanarligu tiltøkunum.

Rannvá vísir á, at millum tiltøkini sum eru uttandura, eru gongutúrar, og haraftrat hava handlarnir í Handilsmiðdeplinum "open by night", eins og langur leygardagur verður dagin eftir.

- Tað hevði tí ikki gjørt nakað, um veðurgudarnir vóru so hampiliga blíðir hesar dagarnar, meðan Mentanarvikan er.

## Fólk fegnast

Tey, sum skipa fyri Mentanarvikuni, hava fingið nógvar ábendingar um, at fólk hava verið sera fegin um mentanarliga partin í sambandi við FaroExpo.

- Hetta hevur eisini givið okkum mót um at taka tiltakið uppaftur nú á triðja ári. Eg haldi, at fólk í størri mun enn áður eru farin at taka mentanina til sín, sigur Rannvá Troest.



# Listaframsýning í býráðssalinum

Systkini Dagny, Jógvan og Nikolina Kristiansen úr Fuglafirði fara at sýna fram list í býráðssalinum í Saltangará í Mentanarvikuni.

Framsýningin verður opin í døgunum 28. oktober til 4. november. Hetta er ein framsýning við blýantstekningum og málningum.

Tey trý hava ikki havt nakra framsýning saman áður, og verður hetta tí ein serliga forvitnislig framsýning at vitja.

Dagny, Jógvan og Nikolina hava altíð teknað nógv, og serliga eru tað portret-myndir, sum Jógvan og Nikolina fáast við, meðan Dagny brúkar akryl og dámar best at mála.

Tey, sum hava sæð listina hjá teimum trimum systkjunum, siga, at tað sæst á teirra listarligu evnum, at "listargenetikkur" er uppi í.

Nærliggjandi er tí at hugsa sær, at tey hava fingið góðu listarligu evnini í vøggugávu frá pápanum, Petur Henry Kristiansen.

Listaframsýningin í býráðssalinum er opin vanligar gerandisdagar frá klokkan 10-16 og leygadag og sunnudagar frá klokkan 15–19.

(-vilmund)

***Trý av børnunum hjá Peturi Henry Kristiansen fara at sýna fram sína list í býráðssalinum í Saltangará í Mentanarvikuni***

***Mynd: Vilmund Jacobsen***